# ABC almennan ársfund

Síðani tað fættist, at ABC Children's AID í Liberia er í ferð við at byggja skúla og skúlaheim til 500 børn nær høvuðsstaðnum Monrovia í Liberia, eru komnar uppringingar úr øllum landinum við áheitanum um at taka foreldraleys børn inn. Hóast skúli og skúlaheim ikki eru liðug enn, hevur ABC longu tikið 49 foreldraleys børn inn. Børnini búgva í løtuni undir vánaligum og trongum umstøðum. Trýstið á felagsskapin um at taka fleiri børn inn er stórt, sigur Matthew Zakeuh, leiðari av arbeiðinum í Liberia. Sambært metingum hjá UNICEF eru 250.000 foreldraleys børn í Liberia. Uttan hjálp uttanífrá hava hesi børn lítlar og ongar vónir um skúlagongd og útbúgving. Í kvøld klokkan 20 hevur ABC barnahjálp almenna ársfund í hølunum hjá Norðoya Sparikassa í Miðlon í Havn. Á fundinum verður framløga við myndum og filmsbrotum við frágreiðing frá arbeiðinum í Liberia. Martin Joensen luttekur við sangi.





*Høgni Hoydal saman við føroyska sendimanni okkara í Brussel, Hákuni Djurhuus*



*Umframt Høgna Hoydal, vóru tvær landstýriskvinnur møttar upp í Belgia. Tær vóru Kristina Háfoss og Bjørt Samuelsen*



*Uml 100 fólk úr tónleikavinnuni eins væl og politisk umboð úr nógvum ymsum londum komu til Atlantic Soundscapes at uppliva føroyska tónlist, list, móta og matgerð*

# Føroyum



*Nýggju, bundnu kjólarnir hjá Guðrun og Guðrun*

ingin hjá Elisu Heinesen, nýggja kjólabindingin hjá Guðrun og Guðrun, filmar hjá Marmar, partar av mínari summarkollektión og vetrarkollektión, umframt svarti, knýtti brúðarkjólin hjá mær.

- Afturat hesum høvdu vit hárkollur hjá Makinder; einum enskum felagi, sum er rættiliga markant innan hársnið. Teir eru altíð við, tá okkurt sker, m.a eru teir stórleverandørar til mótavikuna í Keypmannahavn. Teir eru ógvuliga frammaliga á marknaðinum og samstarva m.a við felagið, sum leverar heimsins bestu ginur. Til akkurát hesa sýningina í Brussel valdu vit at pakka alt andlitið á ginuni inn, soleiðis at hon var heilt sveipað í hári, greiddi Barbara frá.

- Tað vóru í grundini Marmar, ið fyrst blivu kontaktaðar av tónleikastaðnum í Brussel um at gera videoinnsløg til tær fýra tónleikaligu framførslurnar, sum skuldu vera. So tær høvdu eina serliga stóra sýning fyri seg, men vóru eisini partur av okkara framsýning.

### Verður sýnt fram í Føroyum

- Í Norðurlandahúsinum fríggjadagin tann 9. mai kl 19.00 fari eg at vísa mína sniðgeving fram saman við Jóhannu á Steinum og Guðrun og Guðrun. Tað er í samband við 25 ára føðingardagin hjá Norðurlandahúsinum, og tey ynskja at gera eitt serligt tema við føroyskari binding. Jóhanna á Steinum vísir mynsturbinding, Guðrun og Guðrun sína leysu, bleytu binding og eg mína knútabinding.

- Eg skjeyt eisini upp at hava Dennis Agerblad við, tí eg helt tað vera spennandi at vísa tað fjølbroytni, sum í grundini er í føroyskari sniðgeving, men tað gjørdist kanska í so progressivt til taðetableraðu finmentanina. Dennis er annars útbúgvin tekstili og hevur handan góða, progressiva estetikkin, sum fer útyvir allan kant. Hann er ein multikunstnari og ger nógv ymiskt, men røturnar hjá honum liggja í klædnasniðgeving. Men tað vera so eg, Guðrun og Jóhanna í Norðurlandahúsinum, greiddi hon mær frá.

### Tónleikurin

Tá Atlantic Soundscapes móttøkan var av kl 20.00, fóru vit øll niður undir til konserthølið, har ljóðroyndir høvdu verið allan dagin. Nú var pallurin til reiðar, og tónleikasýningin byrjaði. Budam vóru fyrst á pallin. Síðani Orca. Eftir Orcu komu Gestir. Og endað varð við Boys in a Band.

Tað er lítil ivi í, at Orca og Boys in a Band áttu mest ógvusliga aftursvarið frá áhoyrarunum í salinum. Tey vórðu fullkomiliga blást um koll av hesum lívligu og spennandi framførslunum; kanska serliga Orca við oljutunnunum, fløskuorgulinum og pelabassinum. Festivalfyriskiparar og fjepparar annars flokkaðust um Orca aftaná framførsluna, og teir hava longu nú fingið upp til fleiri festival-gigg í hús.

Jean-Louis Brossard, ið hevur verið tónleikastjóri fyri franska, alternativa tónleikafestivalin Trans Musicales í Fraklandi síðani 1979, var á staðnum. Hann var blivin somikið hugtikin av Orca, tá hann hoyrdi fløguna hjá teimum, at hann beinanvegin bookaði bólkin á næstu skránna hjá festivalinum. Konsertin hetta kvøldið gjørdi hann bara enn meira sannførdan um sína skjótu avgerð.

- Orca er tónleikur, ið fer beint í hjartað hjá mær. Hetta er ein bólkur, ið eg trúgvi nógv uppá, og eg fari avgjørt at gera mítt fyri at fáa skipað teimum ein góðan tónleikatúr til Fraklands, segði Jean-Louis Brossard.

Afturat hesum hava Orca fingið booking avtalu í lag, og sum skilst á lagnum, eru festivalar eisini farnir at ringja eftir Budam. Hvussu langur listin av áhugaðum bransjufólki er longu nú, hvat annars er í ferð við at spyrjast burturúr tiltakinum og meira prát við fólk úr tónleikavinnuni í Fraklandi og Belgia verður í blaðnum morgin, tá vit í tónleikasíðunum fara nærri inn á tónlistarliga partin av Atlantic Soundscapes.

Les meira um tiltakið á *www.myspace.com/atlanticsoundscapes*



*Svarti, knýtti brúðarkjólin hjá Barbaru í Gongini, ið var høvuðsverkið í klædnasýningini hjá henni*